# Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu

Til fakfelagslimir

Tórshavn, 21. mai 2021

**<u>Vit hava tørv á tínum íkasti til at betra um arbeiðsumhvørvið hjá føroyingum</u>**

Við stuðli frá Granskingarráðnum, Betri Stuðul og Fakfelagssamstarvinum, fer kanningin “Arbeiðið og tú” nú av bakkastokki. Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu fer undir hesa verkætlan, ið hevur til endamáls at kanna arbeiðsumhvørvið hjá øllum føroyingum eldri enn 18 ár.

Við verkætlanini vilja vit fegin hava svar frá øllum arbeiðstakarum í Føroyum, til tess at betra um arbeiðsumhvørvið. Úrslitini verða sostatt til gagns fyri teg, tín arbeiðsgevara og teir myndugleikar, ið hava ábyrgd fyri og eftirlit við arbeiðsumhvørvinum hjá føroyingum.

Tað tekur umleið 30 min. at svara spurningunum, ið eru at finna her: https://redcap.link/arbeidsumhvorvi. Tíni svar eru dulnevnd og verða goymd trygt á einum ambætara í Føroyum. Tað verður sostatt ógjørligt – hjá starvsfeløgum, arbeiðsgevara ella øðrum – at síggja júst, hvat tú hevur svarað.

Um tú hevur tørv á pappírsútgávu ella á annan hátt hevur tørv á hjálp til at svara spurningunum, ert tú vælkomin til at seta teg í samband við verkætlanarleiðaran.

Takk fyri hjálpina!

Vinarliga

Annika Helgadóttir Davidsen,
verkætlanarleiðari
Sálarfrøðingur og phd

Pál Weihe,
Yvirlækni og professari

Arbeiðsumhvørvi

Sjúkrahúsverk Føroya
Sigmundargøta 5, FO-100 Tórshavn
Tlf.: +298 31 66 96, Fax: +298 31 97 08, T-postur: dfaa@health.fo